GAMLI HANDIL
í Heiðunum

Reglugerð fyri Gamla Handil

1. Gamli handilin er m.a. ætlaður framsýningum av myndlist; einstaklinga-framsýningum ella minni umfatandi felagsframsýningum. Eigararnir kunnu tó í serførum geva loyvi til aðra nýtslu av bygninginum.

2. Avtala um framsýning verður gjørd við Kunningarstovuna í Saltangará ella við eigararnar. Lykilin til handilin skal latast eigarunum beinanvegin, tá tann avtalaða tíðin er úti.

3. Framsýnarin ella tann, ið ábyrgd hevur av framsýningini, hevur skyldu at fara vandaliga um bygningin, og tað er ein treyt, at bygningurin verður latin aftur í sama standi, sum tá ið hann varð fingin, herundir at ruddað og vaskað.

4. Tað er ikki loyvt at negla í veggirnar, og verða øll listaverk, ið hanga skulu á veggjunum, at festa í teir listar og plátur, ið settir eru upp til endamálið, við krókum e.l. Tað er ikki loyvt at negla í listarnar.

5. Sum gjald fyri at nýta bygningin skal framsýnarin lata 10% av upphæddini, ið selt verður fyri. Tó minst kr. 1.200,-. Um einki verður selt kann mann lata listarverk ístaðin. Roknskapurin skal verða uppgjørdur í seinasta lagi eina viku eftir, at framsýningartíðin er úti.

6. Tá ið framsýningin ikki er ætlað sum søluframsýning verður at gjalda kr. 300,- um dagin.



Eigari: Olivar J. Olsen
727 Árnafirði
tlf. 217464

Lykil: Nelly Olsen
Gerðisvegur 29
600 Saltangará
tlf. 448793

Kunningarstovan í Runavík
Heiðavegur 26
600 Saltangará
tlf. 449449